Vit eiga eitt gott lið

Fyrrverandi stórleikarin á landsliðnum og hjá Kyndli, Sverri Jacobsen, hevur góðar vónir um ein góðan dyst fríggjakvøldið

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Tá landsliðið kl. 20.00 fríggjakvøldið fer á vøllin í Ítróttahøllini eru helst fleiri áskoðarar, sum fegin vilja geva leikarunum nøkur góð ráð. Mikukvøldið spurdu vit fyrrverandi landsliðsleikaran, og núverandi H71-venjaran, Sverra Jacobsen, um hann taldist millum hesi, men tað roknaði Sverri tó ikki við.

– Góð ráð kann eg sum so ikki geva teimum. Palli hevur sjálvur verið við somikið leingi, og hevur roynt so nógv á landsliðnum, so hann mann vita fullvæl, hvat krevst av leikarunum, sigur Sverri um hendan spurningin.

Væntar ein góðan dyst

Tá prátið so fellur inn á dystin sjálvan, er Sverri tó meira fúsur at svara.

- Eg rokni við, at vit fara at síggja ein góðan dyst fríggjakvøldið. Okkara menn hava verið onkran túrin uttanlands, har teir so eisini hava sæð, hvussu hondbóltur verður leiktur í londunum uttan um okkum.

– Hetta er so avgjørt nakað, sum fer at koma teimum til góðar. Ikki minst, tá tað ræður um at steðga væl vaksnum mótstøðumonnum, sum kunnu tykjast so stórir samanborið við okkum føroyingar, sum ofta er heldur lágvaksnir.

– Akkurát hvussu dysturin fer at ganga veit eg ikki. Vit møta eitt mótstøðulið, sum áður hevur hoyrt til absolutta heimstoppin, men sum seinnu árini ikki hevur havt so góð úrslit. Nú eru teir tó í ferð við at byggja nakað nýtt upp, og ungdómslið teirra teljast so avgjørt millum tey sterkastu í heiminum.

– Tað sum kanska kann verða ein fyrimunur fyri okkum er, at eystureuropeisk lið aloftast eru 100% professionel. Hetta kann gera, at um teir kenna seg tryggar í sigrinum, so ansa teir heldur eftir ikki at overa seg, ístaðin fyri at vinna so nógv sum gjørligt.

Hendir hetta, samstundis sum okkara megna at hanga í, so ivist eg ikki í, at vit fáa ein góðan dyst. Eisini tí eg meti okkara landslið at vera sera gott. Teir eru væl førir fyri at spæla góðan hondbólt, og er dagurin hin rætti, so kann tað gerast heilt stuttligt.

Neyðugt við avbjóðingum

Flestum kunnugt, so hevur Sverri jú roynt seg í fleiri altjóða dystum fyri føroyska liðið, men hann heldur ikki, at tað ber til at samanbera hondbóltin tá og nú.

– Har er so øgiliga stórur munur. Spælið í dag er skjótari, liðini er nógv betri fyri við skjúttum, og tekniskt eru tey eisini væl betri fyri. Hetta er ein menning, sum alla tíðina hevur verið. Eisini her heima hjá okkum.

– Onkun tíð hevur menningin kanska ikki verið so sjónlig, og onkur hevur hildið, at hon er steðga, men hon hevur alla tíðina verið har. Ikki minst síðani vit fingu landslið fyri yngru leikarar. Her síggja leikararnir, at tað eru stórar avbjóðingar uttan fyri Føroyar, og hetta er sera mennandi hjá teimum.



Sverri Jacobsen hevur góðar vónir fyri einum undirhaldandi dysti
Mynd: Álvur Haraldsen

Vónbrot fylgja eisini við

Fyri landsliðsleikararnar, sum í dag fara á vøllin, er einki at ivast í, at talan er um eina serliga løtu. Hinvegin eru eisini onkrir, sum ikki sleppa á vøllin, og hjá fleiri teirra er vónbrotið helst stórt

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Fram til í gjárkvøldið var Bjarni Wardum í bíðistøðu. Tá skuldi Áki Olsen geva boð um, hvørt hann fekk spælt við ella ikki
Mynd: Álvur Haraldsen

Tað mundi koma óvart á mong, tá Útvarpið um døgurðaleitið mikudagin bar boðini um, hvørjir leikarar í fyrsta umfari vóru tiknir út til landsdystirnar móti Rumenia. Í øllum førum tá hugsað verður um, hvørjir leikarar ikki vóru við í hópinum.

Millum hesar taldist nevnliga ein av heilt stóru profilunum á Kyndilsliðnum, sum í vetur hava verið teir einastu, sum hava megnað at gjørt Vestmenningum fortreð.

Talan er um Bjarna Wardum, sum hóast unga aldurin, 22 ár, longu í fleiri ár hevur verið roknaður millum álitini á Kyndilsliðnum. Fyrsta dystin í bestu deidini fekk hann á heysti í 1996, og síðani hevur talan verið um hópin av dystum og málum. Árið í ár hevur í so máta ikki verið nakað undantak, og nú grundspælið er liðugt, stendur Bjarni skrásettur fyri 87 mál, og er næst ovastur á máltindinum í FM-kappingini.

Nú var hópurin, sum lýstur varð í Útvarpinum, ikki endaliga staðfestur. Landsliðsvenjarin, Palli Joensen, hevði framman undan sagt, at hann helst vildi hava mikukvøldsvenjingina við, og tá hendan var av, var Bjarni hóast alt nakað nærri endaliga hópinum. Hetta tí hann var tikin við á ytsta sessin, soleiðis at hann skuldi vera tøkur, um tað ikki bar til at fáa Áka Olsen kláran til hópin.

Vónbrotin

Tað er tó einki at dylja, at tá hópurin varð kunngjørdur, var tað ein vónbrotin Bjarni Wardum, sum hevði fingið at vita, at hann ikki taldist millum leikararnar í hópinum.

– Tað er sjálvandi ikki serliga stuttligt at sita uttanfyri, tá man er vanur at vera við.

– Vit hava jú offra nógva tíð upp á hetta, og millum annað varð jólafrítíðin nýtt til eina venjingarlegu í Danmark. Har spældi eg við í tveimum av teimum fýra dystunum, men avrik míni vóru kanska eitt sindur misjøvn, so sjálvur hevði eg tá eitt sindur blandaðar kenslur.

Ætlar sær við aftur

Er vónbrotið um væntandi úrtøkuna stórt, so er tað tó ikki størri enn sum so, at Bjarni vil sleppa at vera við til dystirnar annað vikuskifti, tá Sveis kemur á vitjan. Eftir venjingina mikukvøldið segði hann eisini, at hann sjálvandi kennir seg sum ein part av hópinum.

– Nú eri eg so í bíðistøðu, og tað er kanska eitt sindur keðiligt, men eg eri so framvegis ikki heilt úti úr hópinum. Fái eg boðini í morgin (hósdagin) so fái eg eisini tíð til at seta meg upp, so tað skuldi ikki verðið nakar trupulleiki.

– Tað er tó eisini soleiðis, at vit hava seks dystir á skránni komandi vikurnar, so fyrr ella seinni vóru eg at fáa kjansin, og so er bara at knalla til, tá hann er har.

– Hatta er jú ein avgerð, sum venjarin hevur tikið, og so kann eg vera so ósamdur, sum eg vil. Tað er so bara nakað, sum man má bíta í seg, og so royna at stríðast fyri at endurvinna plássið í hópinum. Vit hava eisini nakrar venjingar í komandi viku, so tá má eg bara stríðast fyri plássinum, sigur kyndilsmaðurin avgjørdur.

Nógv at siga

Hóast hann sostatt ikki var heilt greiður um, hvønn leiklut hann fer at hava í dystinum, so ivast Bjarni ikki í, hvønn týdning landsliðið hevur fyri leikararnar.

– Tað er klárt, at tað hevur stóran týdning. Tað er ein stoltleiki at umboða land títt, og tað er eisini nakað, sum gevur bæði stuttleika og upplivingar at vera við.

– Tí er tað sjálvsagt, at hetta er ein stór gularót sum hondbóltsspælari. Nakað, sum mann hevur hugsað um øll ungdómsárini og droymt um at sleppa at uppliva.

– Í løtuni so eri eg tó eitt sindur keddur um støðuna, og tað haldi eg eisini, at eg eigi at vera. At vera 13. maðurin er altso ikki serliga hugaligt, og var eg nøgdur um tað, so hevði eg einki at gera í hesum høpi, sigur Bjarni at enda.

Fyrsta málið er rokkið

At Halgir Dahl-Olesen nú er at síggja á landsliðnum, kemst sambært leikaranum sjálvum av einari orsøk. Nógvari og áhaldandi venjing

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Ein av teimum, sum í mun til landsdystirnar móti Grønlandi fyri knøppum ári síðani, hevur spælt seg inn á landsliðið, er H71 leikarin, Halgir Dahl-Olesen.

Gott kappingarár

Í heyst varð hann úttikin til bruttohópin, og nú hópurin til dystirnar móti Rumenia er úttikin, telist Halgir eisini millum leikararnar í hesum.

Framhald á næstu síðu

… Fyrsta málið er rokkið

Tá vit eftir venjingina mikukvøldið ynskti Halgiri tillukku við úttøkuni, spurdu vit hann samstundis, hvat eftir hansara tykki hevði gjørt, at hann nú taldist millum landsliðsleikararnar.

– Tað er sjálvandi fyrst og fremst avrikini hjá mær higartil í ár. Sjálvur haldi eg, at tað hevur gingið sera væl, og í løtuni er eg eisini toppskjútti í landskappingini, og tað viðførir sjálvsagt, at eg eri vorðin meira sjónligur.

Venjing og venjing

Spurdur, hví hetta kappingarárið hevur eydnast somikið væl higartil, er Halgir ikki í iva, tá hann skal svara spurninginum.

– Tað er einki at ivast í, at tað er venjingarstøðan, sum hevur gjørt tað. Eg vant nógv, bæði við liðnum, og eisini fyri meg sjálvan. Síðani kappingarárið í fjør var av, havi eg í fyrsta lagi róð kapp, og síðani rann eg regluliga til hondbóltsvenjingin byrjaði aftur.

Spurdur, um tað í fjør var eitt vónbrot, ikki at verða úttikin til landsliðið, og um hetta kanska hevði gjørt sítt til øktu venjingina, svarar hann, at tað er tað.

– Tað er einki at ivast í.

Eftir kappingina í fjør setti eg mær sum mál, at eg skuldi á landsliðið til hesar dystirnar, og at tað nú hevur eydnast, eri eg sera fegin um.

– Nú er so bara eftir hjá mær at liva upp til álitið, sum venjarin hevur givið mær.

Gloym virðingina

At enda spurdu vit so Halgir, hvussu hann fyrireikar seg til dystirnar, og hvat hann heldur hevur týdning, fyri at Føroyar kunnu fáa eitt gott úrslit.

– Eg fyrireiki meg sum so ikki á nakran serligan hátt. Royna bara alla tíðina at hugsa um uppgávuna, og kanska eisini droyma um hana, og so tá dysturin er, ræður bara um at sleppa øllum øðrum.

Júst hetta at sleppa øllum øðrum, heldur H71-leikarin eisini vera týdningarmikið, um eitt gott úrslit skal røkkast.

– Vit skulu bara gloyma alt um nervar og virðing fyri mótstøðuni. Gera vit ikki tað, so kann spælið gerast og stirvið hjá okkum. Vit skulu rætt og slætt út og vera so arrogantir, sum yvirhøvur gjørligt.

Halgir hevur miðað eftir landsliðnum seinasta árið ella so, og nú er málið í fyrstu atløgu rokkið hjá honum
Mynd: Álvur Haraldsen

Lesið Ítróttasosialin á alnetinum www.sosialurin.fo

KROSSORÐ

255	MÁN-AÐUR	MAÐUR	NAVN	ROKNI-FJØL	ÍLAT	GUÐUR	LASTA	ÍTALIA		KONU	KONA	FLAT-MAÐKUR	AÐBEIÐ	ÁBER-DEEN	GÍPALD	TURDLEV
FØLV	1								HORN							
									FLIOR							
STATUR								BÁKKI			2			GULL		
								KRØKJA						ALFA		
KANÓN-SKIP									LÍT-FERST							ÁSING-AÐ-TALA
									GRAMM							
FÍSKUR					BÁKIÐ									RØALD PELSEN		
					NAVN									1000		
GULL			FYRI-SETING			RADON			STAÐA-NAVN	ROMAR-TAL		LOT	RÓHDAR-FAR			
						"JA"				NULL			ÁRIMA			
EINS			FYLGI	3										DANI		
			TRØYST-AR											BÚ-STAÐUR		
	STAÐA-NAVN	URAN		KONA				RØNNE		GULL			SKRÁN			
		EINS		HEIMS-PARTUR				TÓNI		NICKEL			KONA			
FRIÐ-RIK						4	VINNING				SØKJA					
							RÚTUR				ÆTT					
SVII						NEYTA-SJÓKA		5				UN			GALWAY	
						BYGD									BETA	
1-0	6							AMPERE		TVÍLJÓÐ		HORN				
								KÁKA				FISKUR				
TONS		MÁTUR										7			NITRO-GEN	
		ALFA														
NATRÍUM			ÍAN								DONSK OYGGJ				500	
			BRAK								MÁL				LAND	
SPANIA		LAND					EU			DAMP-SKIP			BÍLUR		8	
		FUGLUR								SVÁVUL			FYRSTI			
MÁL			9	RADON					MISSUR							IKKI TÁ
				TÓNI			YTTRIUM		EINS							
	KELI-NAVNI						HOLLAND			DÚGVU-LÝÐ	10					
	NORGE						TVÍLJÓÐ			500						
SAM-GONGA					MAÐUR						RHODE ÍSLAND			BEINAN VEGIN		

Vinnari:

Súsanna Slættanes
Pedda við Stein gøta 16
100 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: DREKKAMUNNUR

D	J	Ú	P	V	A	T	N	S	T	R	O	L	A	R	I
U	I	G			G	Í		N		A		Í	Ð	A	N
N	R			V	A	Ð	B	E	I	N		N	A	I	N
N	I	E	L	S-P	A	U	L	I		G	U	L	N	A	
U	P	P	I		E	R		L		K	Y	K		A	N
H	E		V	Á		R	A	U	L			V	A	R	G
Y	L	U	R		B	I	R	T	A		P	E	R		A
L	I	N	U	B	Á	T	U	R		T	E	Y	M	A	R
U	K		M	Á	L		M-U			Á	R	L	A		Ð
R	A	K		R		A		M-S			M	A	R	I	S
254	N	R		A	U	T	O	L	Í	N	U	R		L	T
N		O	K	N	I	N		A	L	D	R	I	N		E
A	L	A	N		G	I	N			R			E		I
N	Á	T	I	N				A	R		S	T	Y	G	G
O		I		E	B	B	E	S	E	N		V-S			U
K	R	A	F	T	B	L	O	K	K	A	B	Á	T	U	R

Loysunar-orðið: _____

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____

255

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- **Grønur var dalurin** - *Richard Llewellyn/ Knút Olsen týddi*
- **Tit bygdu hetta land** - *Arbeiðsmarknaðurin Jákup Pauli Strøm*
- **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- **Frumsagnir** - *Neil Philip/Amy Tausen týddi*
- **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt

Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn - og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .« á bjálvan.